

# Manga takk

Frokosturin í forsætismálaráðnum er nú liðugur og samráðingarnar eru av álvara byrjaðar

Klokkan er nú 14:15.

Fyri løtu síðani komu øll tey høgu fólkini saman við embætisfólkum sínum út úr speglsalinum við kós móti samráðingarrúminum.

Á odda gingu limirnir í donsku stjórnini saman við embætisfólkum sínum, og eftir teimum fylgdu føroysku landsstýrisfólkini saman við stóra riðilinum av føroyskum embætisfólkum.

Sum vit skiltu á føroyingunum, smakkaði maturin frá danska forsætisráðharranum óføra væl.

# Hol sett á samráðingarnar

John Johannessen av Christiansborg



Klokkan fimm minuttir yvir eitt komu umboðini fyri bæði londini inn í forsætismálaráðið. Leiðin gekk beinleiðis inn í speglsalin, har føroyingarnir og danirnir fingu sær ábit áðrenn farið varð undir samráðingarnar. Á matarskránni stóðu sild, kotelettir, ostur og hvítvín, so sigast kann av sonnum, at talan var um danskt ábit.

### Hýrurin góður

Tað var heilt greitt, at hýrurin var góður bæði á føroyingum og dønum, tá teir komu inn í forsætismálaráðið. Tó tóktust fólk ógvuliga spent, eins og náttúrligt er.

Eisini í tronga pressurúminum her á Christiansborg er spenningurin í hásæti í løtuni, hóast eitt sindur av tekniskum trupulleikum hava verið. Her sita um 10 fjølmiðlafólk og senda tíðindi heim til Føroya við jøvnum millumbilum.

Útvarpið er væl umboðað við fýra fjølmiðlafólkum. Sjónvarpið hevur eisini fólk á staðnum og bæði tey stóru bløðini, Dimmalætting og Sosialurin er umboðað við hvør sínum blaðmanni og hvør sínum myndamanni.

### Danir stóran áhuga

Eisini danskirfjølmiðlar eru væl umboðaðir í statsministeriinum í dag. Her ganga sjónvarpsfólk, útvarpsfólk og blaðfólk innar á gólvið í føroyska fjølmiðlarúminum og spyrja um støðuna í Føroyum, nú farið er undir samráðingarnar.

Men enn ber ikki til at siga so nógv, tí beint nú sita partarnir í stongdum rúmi saman.

# Vit siga einki fyrr enn klokkan fýra

John Johannessen av Christiansborg 13:10



Fyri løtu síðani fóru danska stjórnin við Poul Nyrup Rasmussen, Føroya landsstýri og ein riðil av embætisfólkum - mest føroyskum - inn í speglsalin at eta frokost.

Ein riðil av fjølmiðlafólkum, bæði donskum og føroyskum tóku ímóti politikarnunum í ganginum á Christiansborg, men strliti gekst at fáa viðmerkingar.

Tann einasti, til bar at fáa orð á, vaar danki forsætisráðharrin, og hann var fámæltur.

– Jeg synes vi skal vent med at komme med bemærkninger til på pressemødet klokken 16, segði Poul Nyrup Rasmussen og fór inn um glasdyrnar ávegis til speglsalin.

Restin av donksu stjórnini kom inn gjøgnum annan enda á bygninginum, og bar tað ikki til hjá mogu fjølmiðlafólkunum at sleppa fram at teimum.

Landsstýrisfólkini úr Føroyum komu eisini inn gjøgnum dyr aftanvert, har pressan slapp framat, og tíkisl bar heldur ikki til at fáa orð á teir.

Tá tropparnir vóru savnaðir og leiðin gekk inn í speglsalin, var viðmerkingin, at hetta er ein søgulig løta.

Politikararnir og embætismennirnir fáa sild, kotelettir, ost og hvítvín í speglsalinum áðrenn farið verður til samráðingar.

# Samráðast til alt er avgreitt

John Johannessen úr Keypmannahavn

**Føroyska Viðskiftastovan, hóskvøld:** Hóast danski forsætismálaráðharrin bert hevur sett tríggjar tímar av til fyrsta partin av ríkisrættarligu samráðingunum millum Føroyar og Danmark, ætlar landsstýrið sær ikki heim aftur fyrr enn tað hevur fingið tað burturúr, sum tað hevur sett sær fyri.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at leistur skal leggjast fyri samráðingunum á hesum fyrsta fundinum. Avtalast skal, hvussu, nær og hvar samráðingarnar skulu fara fram, og eisini skal finnast fram til, nær tey ávísu málini vera viðgjørd.

Eitt liðugt sáttmáluppskot varð á fundinum lagt fyri danir, og skal hetta uppskot vera grundarlag fyri víðari samráðingunum.

Tá Sosialurin fór til prentingar klokkan trý í gjár var fundurin í danska forsætismálaráðnum enn ikki liðugur, og tí ber ikki at siga, um landsstýrið megnaði at fáa lagt alt sítt fram hesar áður nevndu tríggjar tímarnar. Men landsstýrið ætlar sær ikki at fara av fundinum fyrr enn hann frá teirra síðu er lokin - líkamikið um hetta tekur longri tíð enn tríggjar tímar.

Sum skilst á føroysku embætisfólkunum, eru tey so mikið væl fyrireikað, at tey klára at fáa fundin avgreiddan upp á ein tíma. Tey vísa á, at tað avgerandi er, hvussu væl danir eru fyrireikaðir.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, sigur, at sáttmálauppskotið, ið er lagt fyri danir, er gjørt út frá uppritinum, ið hevur verið til viðgerðar í uttanlandsnevndini. Men hædd er sjálvsagt eisini tikin fyri tilmælunum, uttanlandsnevndin hevur gjørt til uppritið. Sostætt er sáttmálauppskotið ein juridisk víðkan av uppritinum og tilmælunum frá uttanlandsnevndini.

Hvat kom burtur úr fundinum í danska forsætismálaráðnum í gjár, ber til at lesa í internetsosialinum.


NÝTT TELEFON-NUMMAR

3-arin hevur fingið nýtt telefonnummar:

3 x 35



- og nýtt telefaxnummar

35 35 36

3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR

SMS · Tel 35 35 35 · Tax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo




# Fingið Steinway klaver

*Í gjár var hugnaløta í Tórshavnar Musikkskúla í samband við, at eitt nýtt og stásiligt Steinway klaver er komið undir lonina*

Dagfinn Olsen

Í samband við, at skúlin er 15 ár sum kommunalur musikkskúli, søkti Tórshavnar Musikkskúli býráðið í Havn um eitt klaver.

Í gjár var hugnaløta á skúlanum á Frúutrø, har umboð fyri býrað og skúla fingu nýggja klaverið at síggja og hoyra.

Og talan er um einki minni enn eitt klaver, ið ber áskriftina Steinway & sons. Tað er eingin loyna, at klaverini, ið Steinway og synirnir framleiða, verða mett millum tey bestu.

Tað vóru eisini nakrir av teim bestu, ið sluppu at royna klaverið hesa løtuna.

Tónleikalærararnir Bjarni Restorff, Jóhannes Andreasen og Stamen Stantchev leiktu.

Sum skúlastjórin Napoleon Nólsoy segði, so er neyðugt við samstarvi, og sipaði hann til samstarv millum skúla og býráð, men eisini til teir 3 leikararnar.

Teir leiktu nevniliga allir saman, um enn ikki allir í senn, men tveir og tveir.

Fyrst legði Bjarni Restorff fyri við at seta spurningin, nær klaver mundi koma til Føroya ella til Havnar. Hann greiddi frá, at hann náttina fyri hevði leitað fram eina gamla nótabók við verkum eftir Mozart, sum H.E. Løbner hevði átt. Bókin var 200 ára gomul og mett at vera frá tíðini eini 40 ár eftir deyða Mozart. Men sostatt var klaver í Havn fyri 200 árum síðani, hvørt tað so var tað fyrsta, ella ikki.

Síðani sessaðust Bjarni og Jóhannes við klaverið og leiktu Norskan Dans 1 eftir Grieg. Bjarni og Stamen leiktu síðani Norskan Dans 2 og Jóhannes og Stamen endaðu við Ungarskum Valsi nummar 8 hjá Brahms.



*Napoleon Nólsoy við Steinwayklaverið*

Eftir hesa løtuna segði skúlastjórin nøkur orð og meðan gestirnir fingu ein kaffimunn, tók borgarstjórin í Havn, Leivur Hansen, orðið.

Hann fegnaðist um nýggja klaverið. Í faldara, ið býttur var út, sást, at stórur bíðilisti er til musikkskúlan og serliga er tað klaver, ið hevur áhuga. Borgarstjórin skrivaði sær hetta aftanfyri oyrað og minti á, at tað góða við skúlanum var, at tað merktist og sást, at her fekst nakað fyri pengingin og tí var so nógv lættari at játta stuðul Hann metti annars, at býrðaslimir høvdu áhuga fyri skúlanum, ið eisini hevur fingið eina vaksandi játtan seinnu árini.

Hann harmaðist um, at klaverið, sum hevur staðið í Listaskálanum, ikki er har longur, men av ymsum orsøkum er farið úr húsinum og enntá úr kommununi. Arbeitt verður við at bøta um henda missin, segði Leivur Hansen milum annað.

Nýggja Steinway klaverið kemur óivað til sín rætt í morgin, tá 12 næmingar fara at kappast um at sleppa víðari til Steinway klaverkappingina, sum verur í Danmark í apríl. Føroyar vunnu hesa kapping í fjør og hava sum heild sera góð úrslit at vísa á í altjóða kappingum. Til staðar í morgin verður eisini Christian Juul Sørensen, ið skipar fyri Steinway kappingini og hann hevur eisini útvegað Tórshavnar Musikkskúla nýggja klaverið, sum Tórshavnar Býráð hevur latið og tað verður mett at kosta einar 250.000 krónur.



*Nakrir av fremstu klaversnillingum okkara royndu í gjár nýggja Steinway klaverið hjá Tórshavnar Musikkskúla*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Ulla Timmermann vann Steinwaykappingina í fjør*

# Dystur um pláss millum tey bestu

***Í morgin verður aftur dystast um at sleppa víðari til Danmarkar ti Steinway kappingina, sum Føroyar vunnu í fjør***

Í morgin klokkan 15 fara 12 dugnaligir føroyskir klavernæmingar úr Havnini, Vestmanna og Suðuroynni at dystast. Hægst 3 sleppa víðari til Steinway klaverkappingina, sum verður í Keypmannahavn tann 8. apríl. Tá verður kappast við ungar danskar og svenskar klaversnillingar.

Føroyar hava luttikið 5 ferðir áður og hava góð úrslit at vísa á. Bæði 1.,2. og 3. pláss og aðrar heiðurslønir. Í fjør komu Føroyar á 1. pláss, tá Ulla Timmermann vann kappingina.

*- do -*


Størstur í síni stødd – við største dieselmotori – til besta prísin

KIA

CARNIVAL

2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "minibussur"



Fæst eisini sum vøruvognur



EINANS 187.800,-

Multibilurin til einhvørja loysn

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

EINANS 225.800,-



Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600